# Skipsstjórar til Smyril

Av tí at báðir skipararnir umborð á Smyrli gevast vegna aldur, verður hervið søkt eftir tveimum skipsstjórum til Smyril at byrja fyrst í novembur ella eftir nærri avtalu

### Starvið
Skipsstjórin hevur leiðsluna og ábyrgdina av øllum virkseminum, sum fer fram umborð á Smyrli, herundir eisini starvsfólkamál.

### Høvuðsuppgávur
- At tryggja at allar formligar ásetingar verða hildnar, herundir allar trygdarfyriskipanir
- At virka fyri mennandi arbeiðsumhvørvi og at tryggja, at trivnaðurin umborð er í hásæti
- At skipa fyri vikuligum fundum við manning og leiðslu umborð
- At virka sum bindilið millum høvuðsskrivstovu og skip
- At hava fíggjarligu ábyrgdina fyri rakstrinum og gera fíggjarætlan
- At tryggja eitt høgt, støðugt og mennandi tænastustøði
- At gera mánaðarligar rapporteringar um fólkaflutningsviðurskifti, virksemi og ætlanir
- At arbeiðssetningurin hjá fyritøkuni verður fylgdur

Talan er um eitt leiðarastarv innan føroyskan ferðafólkaflutning við spennandi avbjóðingum, har skipsstjórin fær ábyrgdina av størstu innanhýsis farleiðini í Føroyum. Viðkomandi kemur at seta sítt fingramerkið á tænastustøði umborð, og kemur sostatt at viðvirka til, at Strandfaraskip Landsins sum heild fær eitt positivt viðmæli, tá talan er um tænastu. Starvið gevur góðan møguleika fyri persónligari og fakligari menning.

### Førleikakrøv
- Vinnubrævsum skipsførari
- Búskaparlig og analytisk evnir
- Góð leiðslu- og samstarvsevnir
- Skal kunna arbeiða málrættað
- Góðan teldufø rleika
- Væl fyri málsliga í føroyskum og enskum

Harafturat leita vit eftir einum persóni, ið hevur drúgvar royndir, er kreativur, nýhugsandi, róligur, upplýsandi og sum dugir væl við starvsfólki og ferðafólki.

### Lønarviðurskiftir- og setanartreytir
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag. Mánaðarlønin (Endaløn) er í løtuni 32.687,- + eina viðbót á 8.214,- umfram ein eftirløn á 1634,-
Arbeiðstíðin er eitt til eitt, umframt feria.

### Umsóknir
Umsókn við avritum skal sendast til:

Strandfaraskip Landsins
Att: Stjóraskrivstovan
Postboks 88
FO-110 Tórshavn

og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi hósdagin 4. oktober 2007.
Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Regin Vágadal, stjóra, á tlf. 343012

STRANDFARASKIP LANDSINS

Strandfaraskip Landins (SSL) eru landsfyritøka undir Innlendismálaráðnum, hvørs endamál er at lúka landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi. Fyritøkan umsitur 29 farleiðir: 22 Bygdaleiðir og 7 Oyggjaleiðir. Samlaða talið av ferðafólkum við SSL í 2006 var 1,1 millión: 620 túsund við bussunum og 480 túsund við ferjunum. Talið av flutningsanleggum er 40 bussar, 8 ferjur og farmaflutningsútbúnaður. Starvsfólkini eru á leið 170 í tali, svarandi til 120 ársverk. Fyrisitingin á SSL er skipað í fimm deildir: Samferðslu-, Sjó-, Fíggjar-, Starvsfólka-, Farma- og cateringdeild.

# Skips-eletrikari/maskinmeistari til Strandfaraskip Landsins

Við hesum verður søkt eftir einum skips-eletrikara/maskinmeistara at seta í fast starv umborð á "MF Smyril". Arbeiðs- og vaktarskipanin er fyriskipað sum 1-1.

Arbeiðs- og vaktarskipanin kann til eina og hvørja tíð verða fyriskipað í mun til galdandi ferðaætlan, eins og skips-eletrikarin/maskinmeistarin kann verða fluttur á annað skip og aðra arbeiðs- vaktarskipan.

### Starvið fevnir um
- Skips-eletrikarin/maskinmeistarin skal vera við til at tryggja, at maskinarið og allar el-instalatiónir eru í so góðum standi at øll, bæði manning og ferðafólk, kunnu kenna seg trygg
- Tryggja at lógir og reglur á økinum verða fylgdar
- Veita ein effektivan dagligan rakstur
- Tryggja, at arbeiðsgongdir eru í tráð við málsetningin hjá fyritøkuni

Skips-eletrikkari/maskinmeistarin skal eisini vera við til at:
- Tryggja ein støðugan rakstur av skipinum
- Seta upp mannagongdir fyri viðlíkahaldsarbeiði
- Hava eftirlit við maskinarínum, el-instalatiónum o.l.
- Samstarva og tryggja gott samstarv við myndugleikar og aðrar samstarvsfelagar

### Førleikakrøv
- STCW áteknað vinnubræv sum Maskinmeistari
- Galdandi heilsuprógv
- Prógv í nýtslu av bjargingarútgerð
- Sløkkileiðaraprógv
- Roykkavaraprógv

### Setanartreytir
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Maskinmeistarafelagið.

### Umsóknir
Umsóknin skal, saman við avriti av vinnubrævið, prógvum og møguligum ummælum, sendast til:

Strandfaraskip Landsins
Att.: Starvsfólkadeildin
Boks 88
110 Tórshavn

### Umsóknarfreist
Freistin at søkja starvið er 8. oktobur 2007, kl. 12:00.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Jan Haldansen, sjódeildin, tlf. 343000, ella við e-posti: jah@ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

Strandfaraskip Landins (SSL) eru landsfyritøka undir Innlendismálaráðnum, hvørs endamál er at lúka landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi. Fyritøkan umsitur 29 farleiðir: 22 Bygdaleiðir og 7 Oyggjaleiðir. Samlaða talið av ferðafólkum við SSL í 2006 var 1,1 millión: 620 túsund við bussunum og 480 túsund við ferjunum. Talið av flutningsanleggum er 40 bussar, 8 ferjur og farmaflutningsútbúnaður. Starvsfólkini eru á leið 170 í tali, svarandi til 120 ársverk. Fyrisitingin á SSL er skipað í fimm deildir: Samferðslu-, Sjó-, Fíggjar-, Starvsfólka-, Farma- og cateringdeild.

# Stýrimaður til Strandfaraskip Landsins

Við hesum verður søkt eftir einum stýrimanni at seta í fast starv umborð á "MF Sam". Arbeiðs- og vaktarskipanin er fyriskipað sum 1-1.

Arbeiðs- og vaktarskipanin kann til eina og hvørja tíð verða fyriskipað í mun til galdandi ferðaætlan, eins og stýrimaðurin kann verða fluttur á annað skip og aðra arbeiðs-vaktarskipan.

### Starvið fevnir um
Stýrimaðurin skal vera við til at tilrættaleggja ein effektivan dagligan rakstur, og at tryggja, at arbeiðsgongdir eru í tráð við málsetningin hjá fyritøkuni.

Stýrimaðurin skal eisini vera við til at:
- Tryggja at trygdin umborð er í samsvari við altjóða krøv
- Tryggja at skipið verður lastað í samsvari við altjóða krøv
- Meta um viðlíkahaldstørvin umborð
- Seta upp mannagongdir fyri viðlíkahaldsarbeiði og dokking
- Samstarva við myndugleikar og aðrar samstarvsfelagar

### Førleikakrøv
- STCW áteknað vinnubræv sum skipari við handilsskipum
- STCW áteknað GMDSS, GOC prógv
- Galdandi heilsuprógv
- Prógv í nýtslu av bjargingarútgerð
- Sløkkileiðaraprógv
- Roykkavaraprógv

Herumframt vænta vit, at tú arbeiðir sjálvstøðugt, ert ábyrgdarfullur og ágrýtin, hevur góð samstarvsevni og góðan røkjuskap.

### Setanartreytir
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag.

### Umsóknir
Umsóknin skal, saman við avriti av vinnubrævi, prógvum og møguligum ummælum, sendast til:

Strandfaraskip Landsins
Att.: Starvsfólkadeildin
Boks 88
110 Tórshavn

### Umsóknarfreist
Freistin at søkja starvið er 8. oktobur 2007, kl. 12:00.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Jan Haldansen, sjódeildin, tlf. 343000, ella við e-posti: jah@ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

Strandfaraskip Landins (SSL) eru landsfyritøka undir Innlendismálaráðnum, hvørs endamál er at lúka landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi. Fyritøkan umsitur 29 farleiðir: 22 Bygdaleiðir og 7 Oyggjaleiðir. Samlaða talið av ferðafólkum við SSL í 2006 var 1,1 millión: 620 túsund við bussunum og 480 túsund við ferjunum. Talið av flutningsanleggum er 40 bussar, 8 ferjur og farmaflutningsútbúnaður. Starvsfólkini eru á leið 170 í tali, svarandi til 120 ársverk. Fyrisitingin á SSL er skipað í fimm deildir: Samferðslu-, Sjó-, Fíggjar-, Starvsfólka-, Farma- og cateringdeild.


# Reyði Krossur Føroya

## Landsinnsavnan
### hjá Reyða Krossi Føroya

**3. novembur 2007**
**kl. 11.00 til kl. 14.00**

Reyði Krossur Føroya skipar fyri húsainnsavning, hús úr húsi við bússum.

Peningurin, sum innkemur, skal brúkast til hjálp har neyð og elendigheit ræður grunda á náttúruvanlukkum, sjúku og ófrið.

Meira á heimasíðu okkara www.redcross.fo

